# Lítil áhugi fyri læknastjórastarvinum

**Starvið sum læknastjóri hevur verið leyst at søkja í eina tíð. Freistin er farin, men av tí, at áhugin fyri at søkja starvið var ov lítil, verður starvið nú lýst leyst enn einaferð. Tað sær út til, at lítil og eingin áhugi er fyri at vera læknastjóri í Havn**



*Freistin at søkja starvið sum læknastjóri í Havn var úti 11. november. Men lítil og eingin áhugi var fyri starvinum, so nú søkir almanna– og heilsumálaráðið enn einaferð eftir nýggjum læknastjóra. Hesuferð er freistin sett 14. desember*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

LÆKNASTJÓRIN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Eingin settur læknastjóri hevur verið á Landssjúkrahúsinum síðani Anne Grethe Mikkelsen varð loyst úr starvinum fyri einum ári síðani, 1 desember 2003, orsakað av samstarvstrupulleikum. Ein bráðfeingis avloysari hevur røkt starvið síðani Anne Grethe Mikkelsen fór.

Grundgevingin fyri, at starvið hevur staðið ómannað so leingi, er, at kannað hevur verið, um grundarlag er fyri at hava trýpartastýrið og tí onkrar broytingar skuldu fremjast, áðrenn starvið varð lýst leyst aftur.

### Broytingar framdar

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í Heilsu- og Almannamálum, sigur, at starvið hevur verið fyribils mannað í eitt ár, tí greiði skuldi fáast á, hvørt skipanin skuldi broytast ella ikki.

Sum er, verður sjúkrahúsið stýrt av einum trýpartastýrið. Sjúkrahússtjóranum, læknastjóranum og sjúkrasystrastjóranum.

– Hetta er ein stýrisháttur, ið krevur óalmindiliga nógv av fólkunum, sum skulu samstarva. Anne Grethe Mikkelsen varð loyst úr starvi fyri einum ári síðani, tí tað samstarvið fungeraði ikki. Tað eru ikki øll fólk, ið fáa arbeitt saman, og tað riggaði heilt einfalt ikki tá. Tí máttu vir umhugsa, um hetta veruliga var besti stýrihátturin, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður.

Hann greiðir frá, at teir ikki vildu søkja eftir og síðani seta ein nýggjan læknastjóra, einans sum eina roynd. Tí varð Petur Ellefsen settur fyribils.

– Petur segði tá sjálvur, at hann bert vildi sita fyribils, inntil vit høvdu fingið greiði á tí, sum var ógreitt viðvíkjandi starvinum. Hann hevur nú sitið í eitt ár, og samstarvið teirra millum hevur gingið heilt fantastiska væl, greiðir Hans Pauli frá.

Tað var altso staðfest, at trýpartaleiðslan kann vera ein framúr góður stýrisháttur, og tí er avgerð tikin um, at leiðslubygnaðurin verður tann sami framyvir eisini.

– Tað er givið, at tá trý fólk skulu samstarva so tætt um eitt so týdningarmikið og stórt økið, so krevur tað, at tey trý fólkini fáa samstarvið at fungera. Tað hava tey trý, sum hava sitið seinasta árið megna framúr væl, og tí hava vit gjørt av at søkja eftir læknastjóra, fyri tey næstu fimm árini, nú, greiðir Hans Pauli Støm frá.

Hann sigur, at tað tó eru nakrar broytingar framdar í samráð við tey, sum seinasta árið hava mannað sjúkrahússtýrið.

– Tá er torført at seta og býta arbeiðsuppgávur og krøv til eitt slíkt trýpartastýrið, áðrenn nakrar arbeiðsroyndir eru gjørdar. Nú hava vit royndirnar, og hava í samstarvi við stýrið broytt nakrar av uppgávunum, mannagongdunum og annað. So nú skuldi tað verið lættari at fingið arbeiðið at glíða, sigur landsstýrsmaðurin.

Hans Pauli sigur, at tað serliga er innan samskiftið á sjúkrahúsinum, at broytingar eru framdar.

– Nú skuldi tað verið lættari at samskift í sjúkrahúsverkinum. Bæði upp– og niðureftir og tvørturum. So tað skuldi lætt um arbeiðið, staðfestir Hans Pauli Strøm.

### Lítil áhugi

Tað ljóðar alt samalt sera gott, og tað var eisini við góðum treysti at søkt varð eftir nýggjum læknastjóra. Freistin at søkja varð sett at vera 11. november 2004. Søkt varð í Føroyum, Danmark og Svøríki. Men tá avtornaði, vóru bert tveir umsøkjarar.

Í Almanna- og Heilsumálaráðnum siga tey, at báðir umsøkjararnir eru skikkaðir til starvið, men at tey ynskja ein breiðari umsøkjaraskara at velja út frá.

Tí varð valt at lýsa eftir læknastjóra enn einaferð. Nú er freistin sett til 14 desember.

Hans Pauli Strøm sigur seg ikki vita, hví áhugin er so lítil fyri einum, at síggja til, so spennandi arbeiði.

– Eg dugi ikki at svara, hví eingin hevur hug til hatta arbeiðið. Tað er spell, tí hatta er absolutt ein sera góð skipan, við trimum pørtum. Nú hava vit eisini broytt skipanina, soleiðis, at hon er liðiligari og mannagongdirnar eru greiðari. Men tað vísir seg, at áhugin er ikki so stórur, staðfestir Hans Pauli Strøm at enda.

# Skraddaraseymaðar Føroyaferðir

**Fyri stuttari tíð síðani lat eitt nýtt ferðaráð upp í Keypmannahavn. Felagið eitur »My Faroe«, og bjóðar skraddaraseymaðar ferðir til Føroya og Grønland. Fríggjadagin gevur felagið út ferðaskrá sína fyri 2005**

Fríggjadagin 3. desember kemur nýggja ferðaskráin fyri Føroyar og Grønland fyri 2005 út. Talan er um eitt sonevnt inspirations- og rejsekatalog. Í skránni stendur millum annað, at My Faroe bjóðar skraddaraseymaðar ferðir til Føroya og Grønlands. Gjøgnum samrøður við kundan um ynski og krøv, verður skipað fyri bæði bólkaferðum, arbeiðsferðum og privatferðum til oyggarnar, sum bjóða alt frá villari náttúru, søguligum minnum og til nútímans shopping.

Tað eru persónligu upplivingarnar hjá Therese Turidardóttir Kreutzmann, ið er stjóri á My Faroe, ið liggja til grund fyri nýggju ferðaskránni. Therese hevur búð í Føroyum meginpartin av lívinum.

Í ferðaskránni ber millum annað til at lesa um lívið í tjúkkum mjørka, ódálkaða náttúru, 70.000 seyðir og fantastiska føroyska friðin, sum gevur bæði likami og sál nýggja orku.

Hon greiðir frá um serligar túrar og upplivingar, sum geva góðan íblástur til eina Føroyaferð.

Í Tíðindaskrivi stendur soleiðis um Therese Turidardóttir og My Faroe..

*»Tað merkist tíðiliga, at hon veruliga ber ein sterkan kærleika til landið... Tað er nógv, sum Føroya ekspertúrin vil býta við øllum øðrum. My Faroe kann nú vísa øllum heiminum hvagani Therese kemur, og eisini víðarigeva allar tær góðu søgurnar og fantastisku upplivingarnar«*

### Jólahugni

Í sambandi við, at nýggja ferðaskráin verður løgd fram 3. des. kl. 13 í Føroyingahúsinum á Vesterbrogade 17 a, 1 hædd, bjóðar My Faroe øllum áhugaðum til jólahugna í Føroyingahúsinum.

Tey bjóða, gløgg og holukøkur saman við livandi ljósum.

Guðrun Sólja fer at syngja løg av nýggju fløguni, sum verður útgivin í januar. Hon byrjar at syngja umleið kl 15.45 og fer at syngja í ein hálvan tíma.

Eisini verður føroyskt design í hásæti. Dudas Design, sum vanligvís húsast í Vanløse, kemur 3. Desember at vera í Føroyingahúsinum, har høvi verður at síggja nýggjasta trendin innan føroyskt design.

Tey, ið hava hug at koma, skulu av praktiskum grundum melda seg til hjá therese@myfaroe.dk ella á tlf. 33313600

**eys**